**10. fl Skúlin við Ziskatrøð**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 9/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (aldursmarkið til koyrikort setast niður)**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
**(aldursmarkið til koyrikort setast niður**

**§ 1**

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 18, stk. 2, nr. 1 verður sett:

" Tó kann persónur, ið er fyltur 16 ár fáa koyrikort útflýggjað við tí treyt, at foreldur/verjar skulu sita við síðuna av føraranum, tá koyrt verður.

2) Nr. "2" verður hereftir nr. "3" og nr. "3" verður hereftir nr. "4".

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

**Viðmerkingar**

Sambært næmingum í 10. flokki, so hava tey flestu ungu longu roynt at koyrt bil, tá ið tey eru 16 ár, sostatt hevði hetta uppskotið verið ein háttur at skipa hesi viðurskifti heldur enn at venda blinda eygað til henda veruleika. At fáa loyvi at koyra bil við tí treyt, at foreldur ella verji situr við síðuna av føraranum síggja vit aftur m.a. í USA. Harafturat verður mangan sagt, at 18 ára gomul eru vandamikil í ferðsluni, og hetta burdi bara gjørt, at tey vórðu betri bilførarar í hesum aldri, tí at tey hava longu royndir í ferðsluni við stuðli frá foreldrum/verjum.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Sára Petersen Høgni Olsen

Anfinn Kallsberg Karin Simona Klein